# HAVA BRÚK FYRI EINUM STÓRUM OLJUFUNDI





*Boripallurin West Phoenix borar á landgrunninum, her síggjast eisini supplyskip og hjálparskip á leiðini*

**SJEYNDI BRUNNURIN** Oljufelagið ENI roknar við at røkka tí endaliga málinum í boringini á landgrunninum um miðjan oktober.

Jan Müller

Hóast strukturin, sum ENI nú fer eftir í føroysku undirgrundini ikki er lítil og heldur ikki ein av teimum størstu, so vóna italsku jarðfrøðingarnir kortini, at boringin á Anne Marie leiðini fer at raka við eitt stórt oljufund.

– Oljugoymslurnar um allan heim minka, og eftirspurningurin eftir kolvetni bara veksur. Tí vóna vit at raka við okkurt stórt – »Big« – í Føroyum. Hetta segði leitistjórin hjá italska fyristøðufelagnum ENI, Eugenio Antonielli á Oljutinginum í farnu viku. Hann vildi tó ikki siga, hvussu stórur møguleikin er fyri at gera eitt fund. Segði at Føroyar eru partur av Hetlandslagdini, sum hevur víst seg at goyma fleiri stórar olju- og gasskeldur. – Jarðfrøðin kennir ikki politisk og geografisk mørk, og tí meta vit møguleikarnar fyri at finna kolvetni føroysku megin markið at verða góðar.

Leitistjórin nevndi tó eisini tær forðingar, sum eru í føroysku undirgrundini, eitt nú basaltið. – Vit halda, at vit skulu bora gjøgnum nakrar hundrað metrar av basalti. Hetta er ein avbjóðing, sum vit tó halda er atkomilig. Vónandi kann okkara boriarbeiði eisini vera við til at skilja undirgrundina betri og